## Webb viðurkennir mitsak

- Eg havi hugt eftir hendingini umaftur, og hatta var eitt mistak. Men vit taka avgerðir eftir besta førimuni, tá dystir eru, og tað er ikki altíð eins lætt at síggja, hvat veruliga fer fram. Somikið bersøgin er Howard Webb, sum leygardagin var fyri hørðum ákoyringum, eftir at hann hevði dømt brotsspark til Manchester United í dystinum móti Tottenham. Hetta gav Ronaldo møguleikan at skora til 1-2, og tað gjørdist byrjanin til eitt rimmar come-back í dystinu, sum Manchester United at enda vann 5-2.




## Gunnar vann silvur

Sunnudagin tók Gunnar Dahl-Olsen lut í fjallasúkklukapping í Pólandi, og illa kann sigast annað enn, at tað gekk heilt væl. Hann bleiv nummar tvey í sínum aldursbólki, har 20 súkklaður kappaðust. Samanlagt vóru á leið 830 súkklarar við í kappingini. Talan var um 75 kilometrar við blandaðari súkkling og nógum avbjóðingum, og sum heild verður mett, at talan var um sera gott avrik hjá Gunnari.




*Predrag Stankovic heilt málið hjá FC Hoyvík reint, til tað bara restaðu fimm minuttir av dystinum móti EB/Streymi*
*Mynd: Sofus Debes Johannesen*

### FAKTA um Løgmanssteypið

**Fjórðingsfinalur**
Mikudagin 29. apríl
TB-AB 1-1 (0-0) 4-5 eftir longda leiktíð og br.kapping
1-0: Hanus Mortensen 47.
1-1: Høgni Joensen 75.

**Víkingur-HB 2-1 (1-0)**
1-0: Andreas Lava Olsen 8.
2-0: Hanus Jacobsen 72.
2-1: Hans á Lag 73.
Reytt kort: Hans Jørgen Djurhuus, Víkingur, 55.

**EB/Streymur-FC Hoyvík 1-0 (0-0)**
1-0: Hans Pauli Samuelsen 85.

**07 Vestur-ÍF 0-3 (0-2)**
0-1: Poul Ennigarð 10.
0-2: Høgni Zachariasen 42.
0-3: sjálvmál 83.

**Hálvfinalur**
13. mai og 28. mai

**Finala**
29. juli

# Bygdirnar eiga finaluna

**AB verður einasta umboðið fyri høvuðsstaðar kommununa í hálvfinaluni, sum Sundalagið og Eysturoy eiga**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

HB er steypaliðið yvir øllum øðrum, men seinastu árini hava sigrarnir ikki verið so títtir, sum teir vóru nógvu tey fyrstu árini, eftir at tað í 1955 varð farið undir steypakappingina. Í sjeyti árunum vann HB átta! steypafinalur, í áttati árunum vann HB sjey finalur, í níti árunum vann HB tríggjar finalur, og í gjárkvøldið varð greitt, at einasti sigurin í fyrsta tíggju árinum í hesi øldini var tann í 2004.

Tað var Víkingur, sum varpaði HB úr steypakappingini og harvið við 2-1 sigri í Sarpigerði segði takk fyri seinast. Sunnudagin vann HB landskappingardystin á heimavølli ímóti Víkingi 2-1.

Í gjárkvøldið var leingi eingin ivi. Heimamenninir vóru væl betri upplagdir. Teir vóru skjótari á bóltinum og vunnu nógv teir flestu nærdystirnar, meðan tað var ógvuliga lítið veiggj í HB, sum saknaði bæði Fróða Benjaminsen og Andrew av Fløtum.

Andreas Lava Olsen legði Víkingar framum. Hóast Víkingur í 2. hálvleiki misti Hans Jørgen Djurhuus eftir høvuðleyst reytt kort, so eydnaðist tað at økja um leiðsluna, tá ið vongverjin í vinstru, Hanus Jacobsen, breyt ígjøgnum og úr eitt sindur spískum sendi í handara síðunetið.

Spenningur kom í aftur, tá ið Hans á Lag í næsta álopi umsetti hornasparksinnlegg til mál fyri HB, men hóast yvirmannaða HB hevði bóltin nógv, so vóru tað víkingarnir, sum í snaráløpum síðstu løtuna høvdu størstu málmøguleikarnar.

### AB umboðar høvuðsstaðin

Einasta felagið úr Tórshavnar kommunu, sum hevur møguleika at verða partur av steypafinaluni ólavsøkudag, er AB.

Seinnapartin í gjár skrivaði Argir søgu. Fyri fyrstu ferð nakrantíð tryggjaði AB sær pláss í hálvfinaluni. Tað gjørdu argjamenn á Sevmýri. Einki mál varð skorað í 1. hálvleiki. Beinanvegin eftir steðgin legði Hanus Mortensen TB framum, tá ið hann setti høvdið undir innlegg frá veteraninum Dan Mortensen. Høgni Joensen javnaði fyri AB, tá ið hann við høvdinum stýrdi frísparksinnleggi úr høgru frá Janusi M. Joensen í málið.

Einki mál kom í longdu leiktíðini, og brotssparkskappingina vann AB 4-3.

### Tað tók sína tíð

Meistararnir og steypavinnararnir í EB/Streymi høvdu á pappírinum lættastu uppgávuna í fjórðingsfinaluni. FC Hoyvík vitjaði við Margáir, har hoyvíkingar vóru stinnir í verjuspælinum, meðan heimaliðið hevði ilt við at skapa málmøguleikar, hóast EB/Streymur hevði bóltin nógv størsta partin av tíðini.

Predrag Stankovic var knassi í FC Hoyvík málinum, men fimm minuttir undan leikloki noyddist hann í meskarnar, eftir at Hans Pauli Samuelsen hevði roynt seg við skoti.



*Tað endaði aftur 2-1, tá Víkingur og HB hittust. Í mun til sunnudagin vóru tað tó hesa ferð Víkingarnir, sum skoraðu tvær ferðir, og so eru teir partur av hálvfinaluni í steypakappingini*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### ÍF átti tryggasta sigurin

Fuglfirðingar tykjast hava fótað sær eftir skinklandi byrjan upp á kappingarárið. Sunnudagin vunnu teir á heimavølli ímóti B68, og í gjárkvøldið var eingin ivi, tá ið teir vitjaðu í Sørvági. ÍF vann 3-0.

Eftir 10 minuttir setti Poul Ennigarð hol á eftir horna, og tríggjar minuttir fyri steðgin økti Høgni Zachariasen til 2-0 við góðum skoti, og stutt undan leikloki varð trivaligi sigurin staðfestur, tá ið vágamenn vóru so óhepnir at gera sjálvmál.

Hálvfinalurnar verða 13. og 28. mai, og finalan verður ólavsøkudag.